# Vegurin til kvinnuna gongur umvegis góman

HUGLEIÐINGAR

*Andras Sólstein*



Vinmaðurin hjá mær Olli líður av sjúkuni KPA, (Kitchen Performance Anxiety Syndrom, køksavriksangist) Hetta er ein líðing fleiri og fleiri mannfólk tey seinastu árini hava fingið, og kemst hon av at hyggja ov nógv at mat-sendingum í sjónvarpinum so sum Jamie Oliver, Ready Stedy Cook, Okkara Kokkar o.s.fr.

Vinmaðurin hjá mær er single. Hann hevur verið single nú í eini 9 ár, frá tí hann var 27 til 36 ár, og nú skal hann á sín fyrsta rættuliga date í fleiri ár, og hetta skal vera á norðoyastevnu. Og hesaferð ætlar hann, at tað skal vera eftir bókini. Gentan er búgvin, ikki ein av hesum fjákutu barokgellunum, sum hann hevur fjasast við í styttri og longri tíð, mest styttri, síðani hann bleiv single. Og hann er ósikkur og fjollutur sum ein pirrutur tannáringur, og í hesum viðfangi hevur hann biðið meg um hjálp. Ein sovorðin "parforholds junkie" sum tú Andy, mátti vita onkur vinaráð at givið mær.

Við hesum boðum møtti eg í íbúðini hjá honum eitt mikukvøld. Eftir at hava tosað eina løtu saman og drukkið nakrar veðrar komu vit til ta niðurstøðu, at hann átti at bjóðað henni ein betri bita, og har er nógv at velja í.

Ein ofta nýttur møguleiki er at fara í býin og lufta plastickortið, bíleggja borð á einari matstovu, og her eru royndirnar -jú dýrari, jú betri-, tað virkar hvørja ferð.

Í Klaksvík er úrvalið av matstøðum ikki stórt. Hereford plagar at virka, men tað er ikki serliga diskret, og tað er eitt av krøvunum, hon hevur sett. Grill er ikki nakað gott hugskot. (Seinri, tá man hevur verið saman í eina tíð, er grill og ein góður DVD-filmur sum t.d. Sleepless in Seattle, gott latín) Eitt vikuskiftið í París er kanska ikki av vegnum, men ein annar møguleiki er at bjóðað henni heim til eina máltíð, og so vita hvussu leikur fer, og tað er her KPA sjúkan kemur upp í leikin.

Kostpyramidan hjá einum single manni er ikki serliga spísk. Hon líkist mest av øllum einum kassa, bygdur av Lørdagspizza, garnerað við fronskum hot dogs. Alt skolað niður við øli ella Jolly. So her er fyrsta forðanin. Ein skjót kanning í køkinum hjá Olla vísir, at nógv skal henda, áðrenn hann kann fáa damuvitjan. Einasta kókibók í húsinum er ein føroysk, sum Olli fekk í jólagávu frá mammu síni fyri fleiri árum síðani. Men føroyingar, oh harragud sum vit eru komnir stutt.

Kókaðan fisk við smelti, garnatálg, fløt ella saltálg afturvið. Grunnishøvd, krympaðir válgarar, grónseið, brakfylla og skarngarnar. Nei, hin føroyski køkurin er ikki serliga pikantur; tað munna vera fáar dámur sum blotna av slíkari matskrá. So eg sigi við Olla, at vit mugu gloyma alt um føroyskan mat. Vit mugu hugsa útlendskt, franskt, italienskt, ella hvat við grikskum mati? Mat sum Homer gamli át, ella Odyssus, Afrodita og hinir gudarnir ótu? Tað mátti imponerað og bloytt flest konufólk.

Tzatziki, pikilia, ouzo. Eg smakkaði orðini, jú hví ikki? Hví ikki umskapa stovuna til eina grikska Ouzoriamatstovu. Fyri grikkalandsfjeppara er tað at sita á einari ouzoriamatstovu, tætt við ein fiskamarknað, drekka ouzo og retsina, eta grillaðar høgguslokkar, hoyra ljóðið frá kajini, kenna angan av høgguslokkinum á grillini, síggja glæmuna av kertuljósunum speglast í eygunum á tí útvaldu, tá hon hyggur at tær sum einum øðrum Zorba, ja tá er tað sjálvt hina griksku sálina, tú hevur rakt. Tá vit eru støddi í Klaksvík og búgva tætt við vánna, so kann man kanska fáa eitt sindur av hesum grikska stemningi við at lata vindeygað upp og hoyra ljóðið frá útróðrarbátunum.

Ella hvat við at hugsað franskt, bouillabaisse, kryddað fronsk fiskasúpan við hvíttleykssmøri og flutes afturvið? Halt kjaft, sum fransmenn duga, hugsi eg við mær sjálvum. Omma plagdi antin at stoyta fiskasoðið burtur ella seta tað fyri kúnna, so primitiv vóru føroyingar.

Sjálvandi er tað mest natúrliga at eta fisk, tá man er í Klaksvík, fiskivinnuhøvuðstaðnum í Føroyum. Lætt er at fáa hendur á rávøruni: tari, goggur, øður, ráur fiskur, igulker, alt kveikjandi fyri kynstrongdina hjá henni, og gera tað sum ein japanskan rætt. Tað hevði imponerað (og scorað), og sjálvandi skal ein royna at fáa hendur á tí vandamikla og eitrandi Fugu-fiskinum, sum skal hagreiðast á ein heilt serligan hátt. Tað skal kitla so merkiliga í tunguni av eitrinum, tá ið ein etur tann fiskin. (Fugu rubripes er 1250 ferðir eitursterkari enn cyanid, og blandað við sake er tað besti kærleiksdrykkur í heiminum. Nakað sum hjá Ólavi Riddararós, ið drakk av drykkisteypinum og "eiturkornið í tí fleyt" og "hon kysti hann so mjúkan" osfr., osfr.)

Men alt hetta skal matgerast, meðan ein gongur og melur í einum silkikimono og drekkur heitt sake og tosar um samuoraiar og ninja. Serliga gott er at læra seg væl at eta við pinnum, og um hon ikki dugir, kann ein imponera við at geva henni smáar lekrar útvaldar sushi bitar í munnin við pinnunum.

Ella flamberað okkurt. Tað er nakað frumkent við at flambera, frummaðurin sum hevur tamarhald á eldinum, kvinna sum hugtikin hyggur at við stórum eygum, blotnar o.s.fr. Ansa tó eftir ikki at hava høvdið útyvir pannuna, tá fest verður í, vit takast við høg oktantøl her!

Skal tað vera føroyskt, kann man nýta t.d. lunda. Lomvigi er eisini góður. Fuglur verður viðfarin og hagreiddur à la "American Psycho". Tað vil siga at tú skalt skera høvdið av og kryvja hann eftir rygginum. Brett á bringubeinið. Tak innvølin út og tak livur og hjarta til varða. Kann steikjast í ovni ella í grýtu. Ella er tað lomvigi, ber til at skrædla hann, og steikja bringurnar. Sós og brúnkað epli afturvið.

Eitt týdningarmikið at minnast til er, at alt skal ikki vera liðugt, tá hon kemur, fleiri konufólk dáma væl at fáa eitt vínglas í køkinum og so bara standa og eygleiða "la Chef", meðan hann fær tað seinasta frá hondini í køkinum.

Vit koma rættuliga í gongd við at fyrireika hugnakvøldið hjá Olla! Til ein romantiskan døgurða er tónleikur og stearinljós eitt "must". "Black Sabbath live evil" ella "Queen live killers" eru ikki hóskandi. ABBA gold er ov didduligt, men "The best of Leonard Cohen", Sting ella Frank Sinatra skuldi verið hóskiligt.

Eitt er at eta, men ein skal eisini duga at práta, leiða eina samrøðu, so ein sleppur undan teimun pínligu løtunum, har hvørgin sigur nakað. Gloym alt um at siga frá filmum, tú hevur sæð. Hvør kvinna tímir at lurta eftir tær siga frá um ein mann, sum rennur runt við berum yvirbelti og einari bazooka undir arminum í Vietnem? Lítið nyttar eisini at tosa um útróður (hóast vit eru í Klaksvík) ella hina ferðina, tá ið tú vart so skít eina ólavsøku, at tú vaknaði, liggjandi mitt á tinghúsvøllinum ólavsøkumorgun í ongum buksum.

Nei skalt tú scora, mugu vit finna upp á okkurt heilt annað. Keypa eina bók so sum Simpleliving, Feng Shui og leggja hana í stovuna, ikki ov sjónska, men soleiðis at hon sær hana og hugsar við sær sjálvari, at her býr ein maður, sum er komin víðari við lívinum. Inni á kjakinum á heimasíðuni kvinna.fo er eitt gott mið at finna uppá evnir at tosa um: øll tey bleytu virðini, urtagarðar, sorg, klænking, út at eta við børnum, barnapengar til einligar mammur osfr. Alskyns evnir, sum konufólk tíma at kjakast um.

*Framhald á s. 43*